# ítróttur

Nr. 114 • leygardagur • 18. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo



*- Vit ætla at vinna á finska liðnum. Eg kenni ikki so nógv til liðið, men at fáa mótstøðulið úr Finnlandi eigur at vera møguleiki fyri okkum, heldur Johan Nielsen*

## Skála venjarin ætlar sær at vinna

**Fyrrverandi toppskjútti hjá VB er í álopinum hjá Tampere, sum í fjør rakk triðja innleiðandi umfari í UEFA Cup**

INTERTOTO
*Jóannes Hansen*

Í kvøld klokkan seks fer Skála Ítróttarfelag fyri fyrstu ferð at stíga inn á altjóða fótbóltspallin. Tá skulu teir á Svangaskarði spæla ímóti finska Tampere United, sum eftir tíggju tey fyrstu umførini stríðist um fremsta plássið. Teir hava vunnið seks ferðir, tríggjar ferðir hevur verið javnleikur, og teir hava tapt eina ferð.

Mótstøðuliðið hevur dyggar altjóða royndir. Teir hava seinnu árini luttikið í europeisku kappingunum. Í fjør rukku teir í triðja innleiðandi umfarið, men avrikini kundu bent á, at teir eru at tosa við. Í fyrsta umfarinum spældu teir ímóti felag úr Luksemborg. Tað endaði báðu ferðirnar við javnleiki, men Tampere helt fram, tí teir høvdu skorað fleiri mál á útivølli enn mótstøðuliðið. So var mótstøðuliðið úr Aserbadjan. Teir vunnu 3-0 á heimavølli og taptu 1-0 á útivølli. Í triðju royndini var OFK Beograd mótstøðuliðið. Í Finnlandi endaði tað við málleysum javnleiki, og í Beograd vann heimaliðið 1-0.

Á heimasíðuni hjá finska felagnum vilja teir vera við, at tað var altjóða luttøkan, sum kostaði í heimligu kappingini. Teir høvdu sett nøsina upp eftir meistaraheitinum, sum teir mettu seg hava manning at vinna, men seinni parturin av kappingarárinum royndist soltin, og so endaðu teir á tiðja plássinum. Tí eru teir í Intertoto í ár, og finska felagið heldur seg hava góðar møguleikar, nú teir skulu royna seg ímóti føroyskum felag.

Sæð við føroyskum eygum er tað áhugavert at staðfesta, at jugoslaviski Velibor Kuponovic er ein av álopsspælarunum. Tá ið Tomislav Sivic í 1996 vandi VB, var hesin Kuponovic við honum í Vági, og hóast tað kanska ikki eru so mong, sum minnast til hansara, so gjørdist hann VB toppskjútti við níggju málum.

Málverjin Mikku Kaven verður mettur sum tann besti í finsku kappingini. Tá ið Finnland og Danmark herfyri spældu vinardyst vardi hann finska málið. Á miðvøllinum er serliga at leggja til merkis nummar fjúrtan, Jarkko Wiss, sum er afturkomin í fnskan fótbólt, eftir at hann í fleiri ár hevur roynt seg í bretskum fótbólti. Hann sigst vera spælstýrari av tí góða gamla slagnum.

### Ætla at vinna

Johan Nielsen og hansara menn vóru í fyrrakvøldið á Svangaskarði og vandu. Setningurin hjá roynda Skála venjaranum, sum áður fleiri ferðir hevur sagt, at Europa Cup er eykauppliviIsi hjá spælarunum, tykist vera størri hesa ferð:

- Vit ætla at vinna á finska liðnum. Eg kenni ikki so nógv til liðið, men at fáa mótstøðulið úr Finnlandi eigur at vera møguleiki fyri okkum. Ein av vinmonnunum hjá Nenad spældi mikukvøldið ímóti teimum. Úrslitið var 3-3, og hann hevur sagt okkum, at teir vóru í 4-3-3 útgangsstøðu, og at teir vardu 4-5-1, sigur Skála venjarin, og hann heldur fram:

- Eg haldi, at okkara lið er hampuliga væl fyri. Fysiskt kundu vit verið longri frammi, men tað gongur rætta vegin. At støðan ikki er betri kemst av, at tað gekk so long tíð, áðrenn vit allir í felag høvdu møguleika at fyrireika okkum til nýggja kappingarárið, sigur Johan Nielsen, venjari hjá Skála, sum fleiri ferðir áður hevur verið í altjóða stríði, og sum ikki sigur seg minnast jugoslaviska álopsmannin, sum áður hevur spælt við VB. Hann og vit undrast á, at fótbóltsminnið hjá okkum er so stytt, tí tá ið Johan Nielsen í 1996 vandi HB, vann VB í triðja umfarinum 2-1 í Gundadali ímóti HB. Tomislav Sivic skoraði fyrra málið, og júst hesin Velibor Kuponovic skoraði sigursmálið!

Skála-Tampere

## Skála spælir sítt spæl

**- Vit ætla okkum ikki at broyta upp á okkara spæl, sigur Skála liðskiparin, sum tó roknar við eini sera truplari avbjóðing móti finska Tampere leygardagin kl. 18**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Leygardagin stendur fótbólturin á Skála fyri síni higartil størstu avbjóðing. Knappliga lopið frá botntil oddastríð í fjør hevði við sær, at Skála í landskappingini vann bronsukrónurnar, og hetta gav eisini felagnum rætt til luttøku í inter-toto kappingini. Ein luttøka, sum skal standa sína roynd leygardagin, tá finska Tampere kemur á vitjan á Svangaskarði.

### Hevur ligið frammarliga

Liðskipari hjá Skála í tí dystinum verður væntandi Pauli G. Hansen, og hann dylir ikki fyri, at tað er við spenningi, at teir nú hava fyrireikað seg til dystin.

- Hetta er jú ein sera stór avbjóðing. Vit hava sjálvandi roynt at savna tankarnar um landskappingina og tær uppgávur, sum vit hava her, og tað haldi eg eisini hevur eydnast. Men kortini, so hevur verið tosað heilt nógv um uppgávuna, sum nú stendur fyri, heldur hann.

Og tað er heldur einki at ivast í, at tað hjá Paula sjálvur verður spennandi at taka lut í altjóða dysti. Seinastu mongu umførini hevur hann drigist við skaða í lærkrikanum, og hevur tí ikki fingið spælt. Men mikukvøldið var hann partur av einum sterkum miðvølli í 4-0 sigrinum á KÍ, og hann vónar, at tað verður pláss fyri sær leygardagin.

- Eg havi sjálvandi hugsað um hendan dystin, meðan eg havi stríðst við at blíva klárur. Og tað sær so tíbetur út til at hava eydnast, staðfestir Pauli.

Tað gjørdi tað hinvegin ikki hjá Alexandur Johansen, sum enn ikki hevur spælt í ár. Hann hevur drigist við argandi skaða í knænum, og tó at vónin var, at hann skuldi verða tøkur til toto-dystirnar, so hevur tað ikki eydnast.

Men í aðrar mátar tykjast allir vera tøkir. Iulian Florescu tók ikki lut í venjingini á Toftum hósdagin, men teir rokna tó við, at hann verður klárur til dystin.

### Spæla okkara spæl

Tá tosað verður um mótstøðuliðið leygardagin, so sigur Pauli alt fyri eitt, at teir vita ógvuliga lítið um hetta lið.

- Serbisku spælararnir hjá okkum hava onkran landsmann í Finnlandi, og á tann hátt hava vit fingið nakað at vita um liðið. Men tað er eisini alt. Vit hava roynt at fingið fatur á onkrum videobandi, men hetta hevur so ikki eydnast.

- Men vit vita, at teir liggja nummar tvey í finsku deildini, so tað er einki at ivast í, at talan er um sterka mótstøðu.

Skála er nú eitt lið, sum vanliga spælir sera framrættaðan og positivan fótbólt. Roknar tú við, at tit fara at spæla meira verjukent hesaferð?

- Tað er so ikki ætlanin at broyta upp á okkara spæl. Vit mugu royna at spæla upp á tann mátan, sum vit duga best. Okkara møguleiki er so helst eisini, um teir undirmeta okkum eitt sindur, sigur liðskiparin hjá Skála at enda.